# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Public Service kostar

Í dag byrjaði harðliga tiltrongda aðalorðaskiftið um Public Service-sáttmálan, sum skal gerast millum løgtingið og almenna føroyska Kringvarpið.

Eitt uppskot er longu orðað, og eingin ivi er um, at intentiónirnar í hesum eru bæði nógvar og fagrar.

Men skal nakað høpi vera í føgru málsetningunum, so er tvingandi neyðugt, at løgtingið eisini tekur støðu til, hvussu virksemið hjá almenna Kringvarpinum skal fíggjast.

Tá nýggja Kringvarpslógin varð smíðað í 2006, viðmerkti Kappingarráðið í hoyringsskrivi, at skuldi ein rímulig avleiðing verið tikin av valdu inntøkuskipanini, har almenna Kringvarpið sleppur at kappast beinleiðis við privata marknaðin, skuldu aðrar rásir/miðlar fingið part av einum kringvarpsgjaldi.

Veruleikin hevur tó verið júst tann øvuti. Kringvarpið hevur síðani á sumri í fjør miðvíst arbeitt við at styrkja um marknaðar- og søluarbeiði sítt. Og tá lýsingarmarknaðurin annars er viknaður í samsvari við búskapargongdina, hevur negativa ávirkanin á privatu miðlarnar verið tvífald.

Í grannalondum okkara er vanligt, at almennu kringvarpini hava avmarkingar. Serliga í mun til, hvussu teirra programvirksemi verður fíggjað. Endamálið við hesum er at geva privatu miðlunum eitt fíggjarligt grundarlag í kappingini við almannakringvarp.

Enn eru tó ongar avmarkingar settar fyri lýsingarpartinum hjá Kringvarpinum, sum soleiðis ótálmað fær loyvi at virka í púra fríari kapping við privatu miðlarnar, samstundis sum stovnurin við tvangskravdum lurtaragjaldi og almennari íløgujáttan hevur eitt politiskt tryggjað inntøkugrundarlag upp á knappar 46 mió kr. umframt at stovnurin ætlandi fær úti við 20 milliónir í inntøkum frá lýsingum, spælivirksemi og øðrum virksemi. Altso virksemi, sum er í beinleiðis kapping við privatu miðlarnar og í beinleiðis andsøgn til politiskt skjalfestu kringvarpssemjuna.

Verður hesin knúturin ikki loystur, fara føgru orðini um Public Service sáttmála bara at skeikla marknaðin enn meira. Tá fær Kringvarpið álagt fleiri skyldur, uttan at peningur fylgir við, og skal leiðslan tá røkja sítt arbeiði, verður neyðugt hjá stovninum at finna enn meira pening á spæli- og lýsingarmarknaðinum.

**Sosialurin**

## Sjómenn skulu hava frí á jólum

**TONY OLSEN**

Ja, so fara tað aftur at verða samráðingr ímillum Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag og hopi eg, at tað er at koma nakað gott burturúr hesaferð, tí nú haldi eg, at vit sjómenn skulu standa saman og krevja okkurt nýtt og gott í sáttmálan, og hopi eg og nógvir við mær, at tað er at lukkast Jan Højgaard at fáa tað við, at flotin undir Føroyum kemur at liggja um jólini, so at vit kunnu verða heima hjá okkara kæru hesa deiligu høgtíð. Eg haldi, at tað er so langt úti, at liggja úti á havinum um jólini, tí at reiðararnir skulu fáa endarnar at røkka saman.

Tað ber simpulthen ikki til, at flotin er so illa fyri, at man ikki kann siga sum so, at nú leggja vit skipini í 10-12 dagar og geva sjómanninum eina væl fortjenta jólaferiu.

Tað skuldi borið til, tí eg veit at 90% av teimum fiskimonnum, ið sigla undir Føroyum høvdu vilja sloppi at verið heima hjá sínum kæru um jólini og er tað mítt ynski og nógvir við mær, at tann føroyski flotin kemur at liggja stillum frá 20. des. til 2. jan., og hopi eg, at Jan og hansara menn fara at megna at fáa hetta í sáttmálan og at Jan ikki kemur at standa einsamallur.

Sjálvur sigli eg við partrolara undir Føroyum, og í fjør komu vit inn tann 23. des. og minnist meg rætt, vóru teir longu úti aftur 26. ella 27. des., og sum eg havi forstaðið, var tað ikki við góðum huga at avstað var farið. Tíbetur átti eg frítúr, og haldi eg, at hetta líkist svartasta ongum og vissi tann túrurin skal redda árinum, ja, so veit eg bara ikki, men tann føroyski sjómaðurin hann sigur bara ja til alt, uttan at siga eitt orð og haldi eg, at vit standa slett ikki saman, tá ið man hevur mest brúk fyri tí.

Vit eiga ein sáttmála í nógv stendur skrivað í, men tað verður lítið gingið eftir honum. Tað eru so nógv ting, ið sjómaðurin ger umborð og á kaini, ið hann eigur at fáa løn fyri enn havið og veit eg um fleiri dømir har menn liggja og taka ís og nógv onnur ting, tá teir koma umborð og uttan løn. Sjálvt um tað stendur í sáttmálanum, at tú skalt hava løn fyri hetta. Men tað fer aftur við borðinum sum so mangt annað.

Í sáttmálanum stendur, at skipið skal vera siglingarklárt tá man kemur umborð, alt fyri at spara reiðarínum nakrar krónur, og tað verður bara gjørt uttan at brokka seg, og líka eitt afturat, ið eg havi upp á hjarta - dugi ikki ordiliga at síggja hvat hendan fiskidagaskipanin er til, tí at hjá partrolarunum er tað soleiðis, at tú kemur inn um morgunin at landa og seinnapartin verður longu farið avstaðaftur, so tað vil næstan siga, at tú fiskar hvønn dag í árinum. Nei, tað skuldi verið so, at flotin lá stillur nakrar bestemtar tíðir av árinum, so sum á jólum/páskum osf.

Annars vil eg hopa, at Fiskimannafelagið kemur at standa fast um nøkur ting, tá ið samráðingar fara at verða, ið koma okkum sjómonnum til góðar og ikki at slaka, tá farið verður til borðið og hopi at ynskir okkara koma í sáttmálan.

Annars vil eg bara siga, at eg taki hattin av fyri Jan Højgaard og haldi, at hann hevur gjørt eitt megnar arbeiði síðan hann bleiv formaður í FF. Ja meir enn Óli nakrantíð kláraði og hopi, at hann fær nógv ár afturat, tí at hann kempar fyri sjómannin - bara mín meining.

Annars ynski eg góðar samráðingar, tá tær verða og góða eydnu Jan Højgaard.

## Føroyska stavraðið?

**DÁVID ISFELD**

*Hósvík*



Eg havi fylgt eitt sindur við í hesum kjakinum um stavraðið og føroyska málið sum heild. Og í dag (23. nov.) hoyrdi eg Una Arge siga í útvarpinum, at teir latínsku bókstavirnir z,x,c,q, og w einki pláss áttu at fáa í føroyska stavraðnum, tí teir hoyra ikki heima har, og teir fara bert at skapa ørkymlan í føroysku stavsetinginí. Eg helt at Uni Arge segði nógv skilagott, og eg haldi eisini, at Uni hevur skrivað nógv skilagott - eins og Sjúrður Skaale hevur sagt og skrivað nógv skilagott um stavraðið. Tó var eitt, ið serstakliga fekk meg at undrast; tað var tá ið Uni segði, at áðurnevndu stavirnir ikki hoyrdu heima í føroyska stavraðnum, tí teir eru latínskir. Uni: einki føroyskt stavrað er til! Tað sokallaða "føroyska stavraðið" er latínskt úr enda í annan - ok, við smáum tillagingum, men tað er alt.

Um vit skulu tosa um eitt føroyskt stavrað, er tað nærmasta vit kunnu koma til: rúnaraðið. Argumentið, um at útihýsa z,x,c,q, og w tí hetta eru latínskir stavir, er tískil fallið til jarðar. Argumentið kann bert standa roynd, um vit hava eitt annað stavrað enn tað latínska, t.d. rúnaraðið, men tað hava vit ikki.

Her er sostatt talan um eina anakronismu: nevniliga tað, at um vit skulu tosa um føroyskt stavrað, má tað sjálvsagt vera eitt stavrað, sum vit antin hava uppfunnið, ella sum vit hava nýtt síðan okkara fyrstu búseting í Føroyum - tá vit fáa okkara nýggja samleika sum føroyingar. Men, sum mongum kunnugt, var okkara fyrsta skriftmál og stavrað, tað, sum vit høvdu við okkum úr Noregi: rúnir og rúnaraðið. Tá vit tosa um tíðarkronologi, uppruna og samleika í ávísum stað við tilhoyrandi stavraði, er tað - ironiskt nokk - ein anakronisma at kalla núlivandi stavraðið "føroyskt", tá tað hevur latínskan uppruna. Og dupult ironiskt er tað, tá ið teir bannaðu stavirnir eisini eru latínskir. Um eitt fremmant stavrað verður føroyskt, við at vit leggja eina lítla skrástriku yvir nøkur úrvald sjálvljóð og skoyta "ð" upp í afturat, so eigur tað eisini at bera til, at montera eitt áttakanta róður í ein Toyota bil og siga, at hetta er ein føroyskur bilur.

Tað er ok at nýta fremmandaorð í einum kjaki um føroyskt mál og stavrað, men tað er burturav ironiskt at vita hvat orðið merkir, fyri síðani at koma í óføri av tí. Tað er gott at duga fremmandaorð, men tað er sanniliga eisini tídningarmikið at nýta tey rætt - ella hava rætt í sínum máli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13:30

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.